# HENT AT VITA TÁ TÚ BYRJAR Á GLASI

# 2024 2025

GLASIR













KOKS

## Hjartaliga vælkomin á Glasir

Eitt spennandi skúlaár stendur fyri durum. Vit gleða okkum at koma at kenna tykkum. Okkara vón er, at tit koma at trívast, læra og mennast.

“Á Glasi útbúgva og búgva vit tann einstaka. Vit kveikja áhuga og forvitni fyri menning og læring. Hetta er okkara avgerandi leiklutur í samfelagnum.”

Soleiðis ljóðar endamálsorðingin hjá Glasi, sum vit hava orðað hetta farna árið. Alt virksemi á Glasi snýr seg um at liva upp til hetta endamál.

Víst er okkara leiklutur í samfelagnum avgerandi. Glasir er Føroya størsti útbúgvingarstovnur. Her ganga umleið 1.500 næmingar, lærlingar og lesandi, og vit hava eitt stórt og breitt úrval av útbúgvingum, bæði á miðnámi og hægri námi.

Glasir er ein stórur skúli. Í hesum faldara er kunning um mannagongdir, leiðreglur og aðrar viðkomandi upplýsingar. Tú hevur skyldu at kunna teg um innihaldið og dagliga fylgja við á samskiftisskipanum skúlans, har vit kunna um ymisk viðurskifti, eitt nú broytingar, felags tiltøk, fráveru og próvtøkur.

Við ymiskleika á øllum økjum taka vit á Glasi ábyrgd av læring, trivnaði og hvørjum øðrum. Hetta er eitt av okkara kjarnuvirðum á Glasi.

Tú hevur sjálv/ur ábyrgd av at vera virkin í undirvísing, samskifti og tiltøkum á skúlanum. Á Glasi hevur tú bestu karmar fyri at læra, og okkara ynski er, at tú gagnnýtir teir til fulnar. Øll læring er viðkomandi, so lat sinnið upp og legg í vaðið.

Hjartaliga vælkomin á Glasir!



Blíðar heilsur

Una Joensen
rektari



## Tann góði felagsskapurin

Á Glasi arbeiða vit fyri einum góðum felagsskapi, har øll verða vird, trívast, taka ábyrgd og hava somu møguleikar. Hetta er eitt av kjarnuvirðunum á Glasi.

Fyri at fáa ein góðan og virknan skúla er umráðandi, at vit trívast. Trivnaður er ein fortreyt fyri, at vit mennast og læra.

Á Glasi er trivnaður raðfest sera frammalaga. Hetta sæst í okkara skilhaldsreglum og í átakinum „Læring og trivnaður“.

Í tí góða felagsskapinum nørist trivnaður. Tit hava helst eisini aðrar góðar felagsskapir uttanfyri skúlan, eitt nú innan ítrótt, ymisk frítíðarítriv o.a.

Á Glasi er tykkara flokkur ein av fleiri felagsskapum. Vit vóna, at tit, sum góðir floksfelagir, gera tykkara til at skapa góðan trivnað í flokkinum og tí skapa bestu fortreytir fyri einari góðari og læruríkari tíð á tykkara lívsleið her á Glasi.



Blíðar heilsur

Magni á Lakjuni
vararektari







## Ein opin hurð

Vit ynskja, at tú á Glasi ognar tær fakligar førleikar, umframt styrki og sjálvsálit til at megna avbjóðingar í lívinum við vísdómi. Saman við lærarum og øllum starvsfólkum skúlans leggur Næmingatænastan alla orku í at stuðla tær í útbúgvingartíðarskeiðnum.

Næmingatænastan er ein samansettur bólkur av eldhugaðum fólkum. Har eru lestrarvegleiðarar, orðblindalærarar, audiologopedar, bókavørðar - øll við sama endamáli - at hjálpa tær á tíni ferð.

Hetta merkir, at umframt dagligu undirvísingina ber til at fáa serfakligan stuðul, vegleiðing og hjálp frá toyminum í Næmingatænastuni.

Fyri at lætta um hjá tær er ein hurð at fara til, har allur stuðul verður samskipaður. Hevur tú brúk fyri stuðli, hjálp og vegleiðing til viðurskifti, ið ávirka skúlagongdina, herundir persónlig, sosial, fíggjarlig ella faklig viðurskifti v.m., kanst tú fara til lestrarvegleiðaran.

Vit fegnast um at hava teg sum næming á Glasi og síggja fram til at fylgja tær á tíni ferð bæði við sigrum og avbjóðingum. Saman stremba vit eftir, at útbúgvingartíðin verður hugkveikjandi, virkin og áhugaverd.



Blíðar heilsur

Annie Fjallsá
Stjóri fyri Næmingatænastuna



## Nærmingatænastan

Ein lestrarvegleiðari er knýttur at hvørjum flokki og fylgir tær gjøgnum alt skúlaskeiðið. Sum næmingur kanst tú trygt og í trúnaði venda tær til tín lestrarvegleiðara við øllum viðurskiftum. Ávísing til sálarfrøðing er umvegis lestrarvegleiðaran.

Um tað er trupult hjá tær at lesa og skriva, kann Lesi- og skrivitænastan hjálpa tær við at seta tiltøk í verk. Endamálið er, at næmingar við orðblindni ella øðrum avbjóðingum innan lesing og skriving, skulu kunna taka lut í undirvísingini á jøvnum føti við sínar floksfelagar. Ein meginregla er, at hjálpin skal gera næmingarnar so sjálvbjargnar, sum til ber.

Bókasavnið er eitt skattkamar av íblástri, ein skapandi snúningsdepil, har tú kanst royna nýggj hugskot, gera verkætlanir og samstarva við aðrar næmingar.

Styrkin í góðum felagsskapi millum næmingar er, at øll verða lyft á eitt hægri støði. Við at samstarva, vísa virðing og umsorgan er lættari at náa settu málunum.

## Næmingaráð

Á skúlanum er eitt næmingaráð, har tit kunnu gera tykkara ávirkan galdandi. Tað kunnu tit eitt nú gera við at stilla upp til næmingaráðið. Næmingaráðið skal í samstarvi við leiðslu, lærarar og onnur starvsfólk røkja áhugamál tykkara á Glasi.

Hvør flokkur skal eisini velja eitt floksumboð, sum hevur beinleiðis samstarv og samskifti við næmingaráðið.

Nærri kunning um næmingaráðsvalið og sjálvt valið sæst í kalendaranum hjá Glasi á heimasíðu okkara glasir.fo.




## Klokkutíðir

Á Glasi nýta vit dupulttímar (90 min.). Hvør dupulttími verður róptur blokkur. Blokkarnir liggja soleiðis:

| | |
|---|---|
| 08:10-09:40 | 1. Blokkur |
| 10:05-11:35 | 2. Blokkur |
| 12:10-13:40 | 3. Blokkur |
| 13:55-15:25 | 4. Blokkur |
| 15:30-17:00 | 5. Blokkur |

Tímatalvan er skipað frá 1.-4. blokk. Eftir tørvi verður undirvísing eisini í 5. blokki. Næmingar hava møtiskyldu til tiltøk, ið eru í skúlatíðini.

## Læringsumhvørvið

Fyri at gera læringsumhvørvið á Glasi spennandi og fjølbroytt verður skipað fyri ymiskum tiltøkum, ið víkja frá vanligu tímatalvuni í og uttan fyri skúlatíð. Vit kunnu, umframt ymiskt frítíðarvirksemi, nevna felagstímar, framsýningar, fyrilestrar, verkætlanir, temadagar, námsferðir, virkis- og stovnsvitjanir.

## Lektiukafé

Tørvar tær hjálp til lektiurnar? Manglar tær íblástur ella bara onkran at sparra við? So er okkara lektiukafé rætta staðið til tín!

Eitt toymi av dugnaligum lærarum og eldri næmingum eru til reiðar at geva tær bestu lektuhjálpina. Er talan um støddfrøði, enskt, alisfrøði ella okkurt heilt annað, so eru tey klár at vegleiða teg ígjøgnum fakligu avbjóðingarnar.

Lektiukaféin bjóðar:

- Hjálp frá eldhugaðum lærarum og royndum næmingum
- Ókeypis mat og drekka
- Hugnaligar umstøður við góðum huglagi
- Møguleikan at hitta aðrar næmingar, fáa íblástur og skifta orð um ymiskt



Óansæð um tær tørvar hjálp til at skilja trupul evni, ella bara hevur hug til at gera lektiurnar í skúlanum, so ert tú vælkomin í lektikáféina, sum er í 5. blokki mánadag, týsdag, mikudag og hósdag frá 4. september uttanfyri bókasavnið.

## Serligir dagar og frídagar skúlaárið 2024-2025

| | |
|---|---|
| 14/08 | Næmingar møta til fyrsta skúladag |
| 28/08 | Námsfrøðiligur dagur – undirvísingarfrí |
| 14/10-18/10 | Heystfrí |
| 31/10 | Námsfrøðiligur dagur – undirvísingarfrí |
| 21/12-03/01 | Jólafrí |
| 14/04-21/04 | Páskafrí |
| 25/04 | Flaggdagur |
| 15/05 | Síðsti undirvísingardagur á gymnasialum miðnámi |
| 16/05 | Dýri Biðidagur |
| 29/05 | Kristi Himmalferðardagur |
| 09/05 | 2. Hvítisunnudagur |
| 26/06 | Prógvhandan |
| 27/06 | Síðsti skúladagur |

## Blokkdagar

Á gymnasialum miðnámi eru blokkdagar; tá hava tit somu lærugrein ein heilan dag. Tað eru 4 blokkdagar hvørt skúlaár.

**Blokkdagarnir verða 3. oktober, 14. november, 9. januar og 6. februar.**




# Kantinan

Umframt heitan døgurða og salatbarr, bjóðar kantinan eitt fjølbroytt úrval av skundverðum, tvíflísum, langbreyðum og øðrum.

- Kantinan er opin mána- til fríggjadag frá kl. 7.15 til 14.15
- Morgunmatur er frá kl. 07.15 til 10.00
- Døgurðin er millum kl 11.15 og 12.30
- Millum kl. 07.00 og 14.00 er vanlig søla.

Døgurði og morgunmatur verður goldin eftir vekt. Fá tær tað, tær tørvar, set tallerkin á vektina, og gjald eftir vekt. Vit vóna, at hetta fer at minka um matspill, og samstundis er einfaldari at keypa ta mongd, tú hevur hug til.

## Samskifti og kunning

Á Glasi hava vit ymiskar samskiftis- og KT-skipanir. Hvør næmingur fær innritanarupplýsingar - brúkaranavn og loyniorð - sendandi. Hetta gevur atgongd til talgildu skipanirnar - teldupost, tímatalvu, skráseting av uppmøting og innlatingum og neyðug forrit. Tú hevur skyldu at rita teg inn á neyðugu skipanirnar dagliga, tí øll kunning verður send tær talgilt.

Tú hevur atgongd til KT-skipanir, teldupost og dátugoymslur, so leingi tú ert undir útbúgving á Glasi. Tá tú gevst, verður brúkari tín strikaður.
Minst tí til, at tú mást taka avrit av skjølum, dátum og teldupostum, sum tú ynskir at varðveita, tá tú gevst á Glasi.

Á leinkinum www.glasir.fo/kt fæst eisini vegleiðing um KT.

Eisini nýta vit kunningarskíggjar og heimasíðuna til ymsa kunning.

**Á næstu síðu sæst yvirlit yvir KT-skipanir, tú skalt brúka**



# Hevur tú

## Tímaglasið



Tímatalva




Skúlating



Lærarabóð




## Outlook



**Teldupostur**



**Bólkar MS 365**




**Kalendari**



# hugt í dag?





## LES/Moodle




Undirvísingartilfar



Lat inn uppgávur



Samskifti við lærara



**Prei!**

Skanna QR-kodurnar, og fá vegleiðingar til at brúka nevndu pallar.

© Glasir, Næmingatænastan




## Skilhaldsreglur

Á Glasi vilja vit, at næmingar og lærlingar skulu røkka málinum við útbúgvingini, og lestrar- og skilhaldsreglurnar eru til fyri at stuðla hesum. Vit raðfesta menning av læring og sosialum førleikum í einum dynamiskum og skapandi umhvørvi.

Lestrar- og skilhaldsreglurnar eru settar í gildi fyri at geva øllum næmingum, lærlingum og starvsfólki á Glasi góðar umstøður at virka undir, og fyri at tær skulu vera karmur um eitt gott læringsumhvørvi.

Lesandi á Glasi hava skyldu at kunna seg um hesar reglur.

Skilhaldsreglurnar kunnu lesast á hesum leinki.

https://www.glasir.fo/naemingar/skilhaldsreglur



## Læring og trivnaður

Vit læra best í einum umhvørvi, har vit trívast og hava tað gott. Glasir er eitt stað, har tað skal vera gott hjá øllum at vera.

Óviðkomandi nýtsla av snildtelefonum, teldlar og teldum í skúlatíðini kann ávirka læring og trivnað, tí skíggjanýtslan órógvar.

Glasir hevur tí gjørt av at hava telefonfría undirvísing, sum merkir, at telefonir verða lagdar í eitt skáp í tímunum, og brúk av teldu/teldlum á skúlanum verður avmarkað, so óviðkomandi nýtsla, sum t.d. stroyming, spøl, shopping og sosialir miðlar, verða soldaði frá.

Les meira um hetta á niðanfyri leinki.

https://www.glasir.fo/laering-og-trivnadur/

# Samband

GLASIR
Janusargøta 3
Postboks 218
110 Tórshavn
post@glasir.fo
+298 616600

# VÆLKOMIN

GLASIR